# Granskaraparkin skal draga vitan til sín



*– Vit mugu gera okkurt, um ikki Føroyar skulu halda fram at veita óviðgjørdar vørur til útlandið, sigur Bjørn Harlou, sum hevur verið í stýrisbólkinum, sum hevur gjørt tilmæli um eina granskarapark í Føroyum*

**– Vit halda, at tað skal gerast nakað við trupulleikan, at eingin vinnulig gransking er í Føroyum, og ein granskarapark kann skapa teir fysisku karmarnar til at vit fáa meira vitan innan biotøkni og biokunning, sigur Bjørn Harlou, sum hevur verið í stýrisbólkinum, sum hevur gjørt tilmæli um eina granskarapark í Føroyum**

GRANSKING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað almenna skal skapar karmarnar, og síðani er tað upp til granskarar og vinnuna at brúka karmarnar.

Tað er høvuðsboðskapurin í eini viðmerking frá Bjørn Harlou, sum hevur verið í stýrisbólkinum, sum hevur gjørt tilmæli um eina granskarapark í Føroyum. Hann svarar í viðmerkingini, sum er prentað aðrastaðni í blaðnum í dag, teimum, sum hava funnist at, at tað almenna blandar seg upp í vinnuliga gransking.

– Vit halda, at tað skal gerast nakað við trupulleikan, at eingin vinnulig gransking er í Føroyum, og ein granskarapark kann skapa teir fysisku karmarnar til at vit fáa meira vitan innan biotøkni og biokunning. Vit mugu gera okkurt, um ikki Føroyar skulu halda fram at veita óviðgjørdar vørur til útlandið, sigur hann.

Bjørn Harlou sigur, at stýrisbólkurin tekur undir við sjónarmiðunum um, at tað almenna ikki skal stýra og skipa vinnuliga gransking, men tað er ein trupulleiki, at so at siga eingin vinnulig gransking fer fram í Føroyum, og tí má okkurt gerast fyri at seta gongd á hetta.

## Skapa karmar

Bjørn Harlou samanlíknar nýggju granskaraparkina við Norðurlandahúsið, sum skapar karmar fyri framførslum á mentanarøkinum.

– Granskaraparkin skal bjóða góðar umstøður til granskarar og fyritøkur, sum hava hugskot, sum kunnu kommersialiserast. Norðurlandahúsið framførir ikki sjálvt symfonikonsertir, sjónleikir ella málar listarverk, men Norðurlandahúsið skapar góðar fysiskar karmar til hetta virksemi, sigur Bjørn Harlou.

– Á sama hátt skal granskaraparkin bjóða fysiskar umstøður, men ikki sjálv standa fyri granskingini í kanningarstovunum.

Viðmerkingin hjá Bjørn Harlou kann lesast í fullum líki aðrastaðni í blaðnum í dag.

# Nú hava hundarnir fingið sítt felag

**Væl av fólki vóru møtt í Róðraneystinum á Argjum, tá ið nýtt hundafelag varð stovnað týskvøldið. Fyrst formaðurin er Vár Lamhauge úr Norðskála**

HUNDALÍV

*Snorri Brend*

**Havn:** Nýggja hundafelagið verður ein partur av Dansk Kennelklub, ið telur umleið 30.000 limir. Henrik Johansen frá Dansk Kennelklub legði sjálva stovnanina tilrættis.

Endamálið við felaginum er at verja áhugamálini hjá øllum hundum í Føroyum, bæði rasu- og blandaðum hundum.

Felagið hevur sett sær nøkur mál, sum ætlanin er at røkka innan fyri tvey ár. Eitt nú skal arbeiðast at fáa nøkur fríøki, har hundaeigarar og hundar teirra kunnu hittast.

Ikki er óhugsandi, at henda ætlanin kann gerast veruleiki rættiliga skjótt, tí borgarstjórin, Heðin Mortensen er sjálvur positivt sinnaður fyri hesum.

Skipast skal eisini fyri ymiskum hundavenjingum og kappingum. Fyri at hjálpa nýggja felaginum í gongd, koma fólk frá Dansk Kennelklub til Føroyar seinni í ár.

Felagið er skipað við einari sjeymanna nevnd við Vár Lamhauge sum forkvinnu.

Í nevndini sita annars Fríða Brekku, Thurid Askham, Lars Mohr Nielsen, Rakul Toftegaard, Poulina Brochie og John Joensen.



*Hundaeigarar hava nú skipað seg í felag. Áhugin fyri felagnum tykist stórur, tí eini 50 fólk tóku lut á stovnandi fundinum*

**Elding søkir eftir barsilsavloysara til skrivstovuna**

Søkt verður eftir barsilsavloysara at byrja 3. okt. 2005
Vit vænta at umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Oniku á tel. 310697
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. sept.

Umsóknir skulu sendast til:
Elding Sp/f
att. Majbritt E. Winther
Postboks 1289
110 Tórshavn

- EIN BETRI LOYSN!

ELDING

ELDING Í SMS TEL 319697 - ELDING EYSTUROY TEL 449697 - ELDING Í KLAKSVÍK TEL 479697

# Føroyskur matur og føroyskt øl til Persson

Á føroyavitjan síni fer svenski forsætisráðharrin, Göran Persson, eisini á vitjan í Klaksvík, har hann millum annað skal síggja fesku liðugtvøruna, sum Kósavirkið framleiðir.

Í hesum sambandi verður døgurði sjálvandi eisini á skránni, og sum skilst, so hava fyrireikararnir gjørt nógv burturúr, at talan bert verður um føroyskar vørur, sum tá standa á borðinum.

Johan Mortensen, sum bæði er stjóri í P/F Baldur, sum hevur nógvan samhandil við Svenskar keyparar, og sum eisini er ein av oddamonnunum hjá Restorff's Bryggjarí í Havn, fegnast um, at tað hesa ferð eisini hevur verið møguleiki at fáa føroyskar drykkivørur á borðið.

Aftur við lunda, feskum fiski og øðrum góðum føroyskum matvørum, verður tað soleiðis øl av ymsum slag frá teimum báðum føroysku bryggjaríunum, sum fer at standa á borðinum. Her hevur annars oftani verið vanligt, at tað eru vín úr eitt nú Fraklandi og Italia, sum borðreitt verður við, men í hesum førinum verður tað altso øl úr Tórshavn og Klaksvík, sum skal standa á borðinum, skilst.

-jm